

## Fýra kvinnur í Smiðjuni

Fríggjadagin tann 18. juli, kl. 15.00 letur spennandi listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík við Susanne Hansen úr Esbjerg og Mary Strøm, Elsu Zachariasen og Birgit Kirke allar úr Havn. Tær sýna fram málningar og skulpturar. Málningarnir eru bæði abstraktir og naturalistiskir, har arbeitt er við strukturi og formum í akryl. Tað at Mary, Elsa og Birgit eru ættaðar úr Føroyum sæst aftur í málningunum. Skulpturarnir er lívsmyndir gjørdir úr endurnýtslutilfarði. Framsýningin er opin til og við týsdagin 22. juli. Allar dagar er opið frá kl. 12.00 - 18.00.

## Metfall í oljuprísi

Týsdagin tók oljuprísurin størsta kavið – mált í dollarum – í 18 ár. Hetta hendi, eftir at Ben Bernanke ávaraði móti avleiðingunum av høga oljuprísinum – eitt nú vandamiklu blandingini av hækkandi inflatión og minni búskaparvøkstri. Prísfallið var yvir níggju dollarar fyri tunnuna, soleiðis at ein tunna kostaði 135,92 dollarar. Mikumorgunin var prísurin tó aftur komin upp á 138 dollarar fyri tunnuna. Fríggjadagin í farnu viku setti oljuprísurin nýtt met. Tá kostaði ein tunna á leið 147 dollarar.

# Hækkið barnafrádráttin

**Hækkið barnafrádráttin um tit veruliga vilja hjálpa barnafamiljunum, sigur Finn Nielsen, stjóri í FK, nú røddir eru frammi um at lækka mvg'ið á ávísum neyðsynjarvørum**

**BRÚKARAMÁL**
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í FK í Hoyvík hava tey alla tíðina tætt samband við matvørumarknaðin, viðskiftafólkini og leverandørarnar. Eisini fylgja tey væl við í orðaskiftinum um príshækkingar á matvørum, og hvussu fólk megna at hóra undan. Í hesum sambandi fýlist Finn Nielsen, stjóri, á, at politikarar nú aftur eru úti við uppskotinum um at minka mvg'ið á ávísum neyðsynjarvørum, fyri at lætta um hjá barnafamiljunum.

- Eg havi sagt tað fyrr, men endurtaki tað fegin: Um politikararnir veruliga vilja hjálpa, var tað so nógvar ferðir ruddiligari at hækka barnafrádráttin. Takið eina prinsipiella avgerð, til dømis eina hækking upp á túsund krónur fyri barni, og latið hana koma teimum til góðar, sum treingja, sigur hann.

### Øgilig umsiting

Finn Nielsen er sannførdur um, at tað nærum er ógjørligt at handhevja eina lóg, har avgjøldini á mat og drekka verður skilt sundur í smærri vørubólkar. Hann vísir á, at tað hevði kravt eina ovurstóra umsiting, so peningurin ikki endaði á skeivum stað, umframt eina umfatandi revsingarskipan.

-Tað hevði ikki verið nakar trupulleiki hjá okkum í FK at lækka mvg'ið á ávísum vørum – tað hava vit bæði tøkniligar og roknskaparligar førleikar til. Men myndugleikarnir høvdu fingið úr at gera, fyri at røkja eina slíka skipan – bæði í mun til eftirlit og revsing, sigur hann.

### Ræðumyndir hjá grannunum

Sum dømi tekur hann Ísland og í Norra, har tey minkaðu avgjøldini á matvørum fyri nøkrum árum síðani.

- Øll sum hava ferðast har vita, at matvørur eru als ikki bíligari har enn her, sigur Finn Nielsen.

Bæði í Íslandi og Norra stinga javnan gølur seg upp, har vinnurekandi spekulera í sundurbýtta avgjaldinum. Eitt nú við at skráseta vanliga vøru sum vøru við lægri mvg'i, fyri á tann hátt at fáa munin útgoldnan frá landinum.

- So eg líti onki á, at tað hevði komið teimum, sum hava tørv á tí, til góðar. Barnafrádrátturin er har frammanundan og er líkatil at regulera. Og tað hevði veruliga gjørt mun úti í smáu heimunum, sigur Finn Nielsen við Sosialin.



*Myndugleikarnir høvdu fingið úr at gera, fyri at røkja eina slíka skipan við sundurbýttum mvg á matvørum – bæði í mun til eftirlit og revsing, sigur Finn Nielsen, stjóri í FK Hoyvík*

# Nógv at spara á bíligaru vørunum

**Bíligu vørurnar eru eins góðar og dýru merkjavørurnar, og har eru sera nógvir pengar at spara, sigur Finn Nielsen, stjóri í FK í Hoyvík**

Finn Nielsen í FK sigur, at tey sjálvandi er varug við, at prísurin hækkar nógv í løtuni, men hann heldur ikki at kundarnar keypa øðrvísi inn enn áðrenn.

- Okkara kundar hava altíð verið rættiliga tilvitaðir um prísin, og vit síggja, at prísurin verður kannaður bæði gjølla og væl, sigur hann. Kortini vísir hann á, at tað saktans ber til at spara nógvan pening, um fólk keypa bíligaru vørurnar.

- Og eg kann siga fyri vissu, at dygdin er líka góð sum á merkjavørunum. Men serliga ung fólk halda, at tey fáa meira fyri pengarnar, um tey keypa merkjavørur, sigur hann, og vísir okkum millum annað á vørur til reingerð, persónliga røkt, smábørn og at baka við.

